Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Eitt likam, sum mennist og styrkist




**Tí vit eru smíð Hansara, skapt í Kristi Jesusi til góð verk, sum Gud frammanundan hevur lagt til reiðar, at vit skulu liva í teimum. Efes. 2,10**

Tað er við takksemi, at vit hyggja aftur á árið, ið er farið, og við vón og treysti hyggja vit frameftir, tí vit hava sett okkara álit á Jesus, sum er okkara loysnari, friður, ja, alt sum okkum tørvar til eina og hvørja tíð.

Árið, ið er farið, var fyri okkum øll í samkomuni merkt av, at vit í januar 2024 høvdu eina fráfaringarløtu fyri Tummasi, sum hevur myndað og leitt samkomuna í fleiri áratíggju. Hetta er ein broyting fyri okkum øll bæði innanhýsis og hjá teimum samkomum og persónum, vit samstarva við og eru tætt knýtt at. Fyri okkum í leiðslubólkinum hevur hetta eisini verið ein spennandi avbjóðing, hóast at vit eisini hava sannað, at tað kann vera trupult at vera sjónlig sum leiðsla, tá ið eingin lønt tænasta er. Tí hava vit eisini tosað um, um tað er greitt fyri samkomuni, hvønn veg vit fara, og hvat vit hava fokus á.

Tí ynskja vit at byrja hetta nýggja árið við at seta orð á hetta. Vit í leiðslubólkinum fara tí at tala tey bæði fyrstu møtini í januar við hesum fyri eyga. Eisini fara vit at geva rúm fyri, at vit kunnu hoyra frá samkomuni, tí vit eru eitt likam, og okkum tørvar, at allir limir á likaminum vilja taka sítt pláss og tað kall og ta útveljing, sum teimum er givið av Harranum. Tað triðja møtið í januar er tí sett av til, at samkoman kann deila sítt hjarta hvør við annan, og vit kunnu bera fram góð tíðindi.

Tað hevur leingi verið lagdur dentur á at styrkja relatiónirnar í samkomuni, og vóna vit, at vit eru komin eitt sindur áleiðis á hesum øki við tí virksemi, sum nú ber til at taka lut í. Tað er gleðiligt, at nýtt miðvíst virksemi er stovnað í samkomuni, og vit í leiðslubólkinum kenna, at ein tann týdningarmesta uppgávan í hesum árinum er at nøra og byggja víðari á tað góða, sum vit longu hava í samkomuni. Tað, sum plagar at vera, morgunmøti sunnudag, sunnudagskúlan, bønamøtini, guttakvøldini o.s.fr. Somuleiðis nøra vit um tað nýggja, sum er byrjað hetta árið, ið júst er farið afturum, barnaarbeiðið mikukvøld, kvinnukvøldini, bønarmøtini mikumorgun, samkomuhugni leygarmorgun o.s.fr.

Um vit knýta Malakias 4,6 ***„Hann skal venda hjørtum fedranna til børnini og hjørtum barnanna til fedrar teirra“*** til okkara virksemi, so kenna vit, at hetta er tað, sum Gud hevur arbeitt í okkum tað seinasta árið. Tí fyri okkum snýr tað seg ikki bara  um at hava aktivitetir, men at vit eru eitt likam, sum mennist og styrkist til at virka í tí kalli, sum Gud hevur givið okkum sum samkoma og einstaklingar. Vit ynskja øllum eitt gott og signað nýggjár við Róm. 5,5 **„og vónin ger ikki til skammar; tí kærleiki Guds er útheltur í hjørtum okkara við Heilaga Andanum, sum givin okkum er.“**

*Leiðslubólkurin*

## Barna- og ungdómsarbeiði



byrjar aftur mikudagin 15. januar kl. 18.30, har vit fara at hugna okkum saman við spølum og ymiskum.

Tit eru vælkomin at bjóða tykkara vinum við.

Vit gleða okkum at møtast.

*Nomi*

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*

# JANUAR 2025

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 4. | | Reingerð: Ingun og co. |
| Sunnudagur | 5. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Kári, David og Nora<br>Ábyrgd/Leiðari: Ása L.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Leiðslan<br>Kaffivertar: Kári, David og Nora |
| Mánadagur | 6. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 8. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 11. | | **Reingerð:** Anna og co. |
| Sunnudagur | 12. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Leif<br>Ábyrgd/leiðari: Anna<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Leiðslan<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Leif |



Sunnudagin 19. verður samanskotsmáltíð eftir morgunmøtið. Tað gleða vit okkum til, og t.v.s. at vit taka øll okkurt við til máltíðina.
Øll eru hjartaliga vælkomin, og vit gleða okkum at síggja tykkum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 13. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mikudagur | 15. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| | | Kl. 18.30 | **Barna- og ungdómsarbeiði**<br>Ábyrgd: Nomi |
| Leygardagur | 18. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| Sunnudagur | 19. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting og innsavnan til húsið og samanskots máltíð** |
| | | Kl. 11.30 | **Barnamøti**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/leiðari: Ása O.<br>Lovsongsleiðari: Tummas, bólkur I<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Samkoman<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 20. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Regin<br>Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Mikudagur | 22. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 25. | | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 26. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Alex<br>Kaffivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner |
| Mánadagur | 27. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur<br>Lovsongsleiðari: Nomi |
| Mikudagur | 29. | Kl. 10.00 | **Bøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.